Fylgiskjal 23

LM-068/2022

Umhvørvis- og Vinnumálaráðið
Postrúm 377
110 Tórshavn

Tórshavn 24. januar 2022

Viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um náttúruvernd

Bóndafelagið og Óðalsfelagið mótmæla staðiliga uppskotinum til løgtingslóg um náttúruvernd, sum ætlanin er at bera í løgtingið í næstum. Uppskotið viðførir tað størsta intrivið í føroyska jarðarlóggávu í nýggjari tíð, har ræðisrætturin til uttangarðsjørðina verður tikin frá festarum og óðalsfólki, og fluttur til almennu fyrisitingina. Inntrivið er somikið stórt, at hetta er eitt beinleiðis brot á ásetingarnar um ognarrættin í § 73 í grundlógini. Harvið er lógaruppskotið í beinleiðis andsøgn við grundlógina.

Sambært núverandi náttúrufriðingarlóg er mannagongdin tann, at um eitt mál er fevnt av gildisøkinum hjá náttúrufriðingarlógini, skal søkjast um loyvi frá friðingarnevndini á staðnum. Hetta kann síðan kærast til yvirfriðingarnevndina, sum tekur endaligu avgerðina. Hetta er ein dómstólslíknandi skipan, sum m.a. gongur aftur í útskiftingarnevndum og landbúnaðarstevnu.

Verður uppskotið samtykt, verður øll skipanin innan náttúruvernd vend á høvdið. Uppskotið gevur landsstýrismanninum víðfevndar heimildir til at gera kunngerðir innan fyri gildisøkið í lógini. Harvið fáa almennir fyrisitingarmyndugleikar við heimild í kunngerð, sjálvir rætt til at taka stig til at skipa fyri einstøkum verndarøkjum. Samstundis verður kærurætturin hjá festarum og óðalsfólki gjørdur munandi veikari enn hann er í verandi skipan. Tað er bæði fulkomuliga óhoyrt og ólógligt at geva einum landsstýrismanni somikið stórar ognartøkuheimildir í kunngerð, og hetta er heldur ikki fyrr sæð í føroyskari rættarsøgu. Ein og hvør við innliti í lóggávu veit nevniliga, at ognartøka bara kann gerðast við heimild í lóg. Verður lógaruppskotið kortini samtykt gerst úrslitið, at vit fáa eitt sjálvtøkuborð til almennu fyrisitingina, har tey sum nú varða av jørðini lítið og onki fáa at siga.

Fyri at taka nøkur ítøkilig dømi burtur úr rúgvuni, so verða heimildirnar sum landsstýrismaðurin fær í kap. 4 í lógaruppskotinum (§18-§31) til at áseta verndarøki so víttgangandi, at útrakstur av seyði vm. í haga, sum vit kenna hann í dag verður munandi darvaður og í nøkrum førum heilt ógjørligur. Sostatt verður hetta helst tað størsta inntrivið í føroyskt húsdjórahald í fleiri hundrað ár. Harumframt hevur uppskotið við sær, at stórt sæð øll lunnindi verða tikin frá jørðini. Til dømis verður ásett í § 6, stk. 3, at "livandi tilfeingi í áum og vøtnum" (t.d. laksur og síl) verður tikið frá jørðini, og lagt inn undir løgtingslóg um sjófeingi. Somuleiðis verður rætturin til fuglaveiðu loystur frá jørðini (§ 7), og lagdur inn undir fyrisitingarmyndugleikan. Í báðum førum er talan um beinleiðis ognartøku, sum er í greiðari andsøgn við § 73 í grundlógini.

At hesi inntrivini eru gjøgnumhugsað og ikki íkomin av tilvild sæst av ásetingunum um endurgjald í § 30-31 í lógini. Harundir kemur sjálvandi møguligt endurgjald fyri mist hagabit, og reglurnar eru snikkaðar soleiðis til, at tað skal verða so lætt sum gjørligt hjá fyrisitingarmyndugleikanum at seta festarar og jarðareigarar til viks. Hetta er í stríð við allan endurgjaldsrætt.

Endurgjald fyri inntriv skal sjálvandi verða veitt eftir vanligum endurgjaldsreglum. Fíggjarligur missur er sostatt ikki bert darvað brúk, sum er í gongd, men eisini minkað søluvirðið v.m. grundað á tey inntriv, sum verða gjørd. Ásetingin í § 31 er somuleiðis púra burturvið, tí har verður sagt, at jarðareigarar og rættindahavarar skulu hava sett fram krav um endurgjald innan fýra mánaðir frá tí, at verndarkunngerðin er komin í gildi. Her vendir eisini alt øvugt, tí vanlig mannagongd er, at tá tað almenna ognartekur jørð, venda myndugleikarnir sær til jarðareigaran við uppskoti um endurgjald fyri lendið, sum er tikið. Sum minstamark

átti sjálvandi at verið ásett, um endurgjaldskrøv kunnu setast ígjøgnum rættarskipanina, sum vanligt er í sambandi við ognartøku. Somuleiðis má ásetast, hvønn rætt festari ella óðalsfólk hava, um hesi ikki halda kærufreistina.

Samanumtikið er lógaruppskotið gjøgnumgangandi merkt av at verða skrivað av fólki, sum ikki hava skil fyri landbúnaði, jarðarlóggávu, ognarviðurskiftum og hvussu føroysku hagarnar verða riknir. Uppskotið er somikið víttgangandi, at tað ikki undir nøkrum umstøðum kann góðtakast, tí inntrivini í privata ognarættin hjá útvið 5.000 føroyingum eru somikið stór, at talan verður um størstu ognartøku í Føroya søgu síðan kongsjørðin bleiv tikin frá katólsku kirkjuni. Henda ognartøka er sníkt inn í lógaruppskotið uttan á nakran hátt at verða nøktandi lýst. Harafturat vil lógaruppskotið hava við sær, at tað verður munandi truplari og í vissum førum ógjørligt at reka landbúnað við útrakstri av húsdjórum í Føroyum.

Bóndafelagið og Óðalsfelagið mæla á omanfyristandandi grundarlagi landsstýrismanninum staðiliga frá at leggja uppskotið fyri løgtingið. Í staðin eigur tað at verða lagt til viks, og lóggávuarbeiðið byrjað av nýggjum, so onnur sjónarmið enn tey lívfrøðiligu eisini kunnu verða gjørd galdandi.

Feløgini bæði eru altíð til reiðar at koma á fund við landsstýrismannin, til tess at greiða nærri frá avleiðingunum av uppskotinum.

Vegna Bóndafelag Foroya
Sigert Patursson
Formaður

Vegna Foroya Óðalsfelag
Niels Pedersen
Formaður